# Hexa – ein fyritøka í menning

Hexa skifti eigarar í januar mánað, og framtíðin sær bjørt út hjá fyritøkuni. Teir eru ein stórur aktørur á íslendska marknaðinum, men vilja gjarna førka seg inn á aðrar marknaðir – eitt nú tann føroyska.

Hexa er ein fyritøka sum framleiðir arbeiðsklæðir. Teir hava verið til í sløk 20 ár, og hevur altíð verið rímiliga stór í Íslandi, men nú tykist tað veruliga sum um, teir eru um at sláa ígjøgnum á altjóða marknaðinum. “Vit eru av álvara farin at økja um okkara virksemi. Vit hava keypt ein nýggjan, størri bygning sum loyvir okkum at hugsa í størri formati”, sigur Guðmundur Sigórsson, leiðari í Hexa.

Seinastu tíðina hevur Hexa ført seg nógv fram, og nú er Hexa fari undir samstarv við felagið Fristad, sum er partur av tí risastóra samtakinum The Quintet Group. The Quinted Group er ein tann størsti aktørurin innan arbeiðsklæðir í Evropa. “Tað, at vit eru partur av The Quintet Group, hevur givið okkum eina heilt aðra slagkraft, enn vit høvdu áður. Vit kunnu nú vaksa um fyritøkuna, tí vit hava ein stóran tryggleika í hesum samtaki”, sigur Guðmundur Sigdórsson við Sosialin. “Vit hava nú fingið møguleika til at gera ein sáttmála við eitt felag í Litava, sum framleiðir fyri okkum”, sigur Guðmundur, og vísur harvið á, at Hexa eru væl við í globaliseringini.



*Starvsfólk á Hexa*

### Heildarloysnir

“Tað sum vit veita kundanum, er ein heildarloysn. Vit hjálpa við øllum liðum í framleiðslu av arbeiðsklæðum, og kundin skal kenna á sær, at hann er í góðum hondum. Og tað er umráðandi at vit altíð gera okkara ítasta, fyri at verða bestir á okkara øki”.

“Nú fara vit at menna nýggjar vørur. Vit arbeiða við nýggjum brand´um, so vit eru bjartskygdir um framtíðina”, sigur Guðmundur.

### Føroyar sum royndarmarknaður

“Vit gleða okkum sera nógv at koma til Føroya, tí at vit halda at vit hava nógv í felag við føroyingar – bæði mentanarliga og vinnuliga. Vit halda at føroyski marknaðurin líkist tí íslendska, tí vit síggja at tað eru nógvir smáir aktørar á marknaðin. Soleiðis er tað eisini í Íslandi. Tískil meta vit, at tørvurin á okkara vørum er tann sami í Føroyum sum í Íslandi”, sigur Guðmundur Sigórsson. Tí hava vit eisini ætlanir um at brúka tann føroyska marknaðin sum royndarmarknað. Nógvar stórar altjóða fyritøkur hava nýtt Ísland sum royndarmarknað, og hetta hevur aloftast rigga væl hjá teimum, tí at so kann ein síggja atburðin og móttøkuna hjá kundunum, áðrenn framleiðslan verður slept av álvara út á marknaðin. Henda vitanin hjálpir okkum við at menna vøruna til fulnar, tí at vit fáa tað neyðuga innlit hjá kundanum”.

“Vit vóna at vit finna onkrar samstarvsfelagar meðan vit eru í Føroyum. Okkum tørvar ein aktør sum longu er inni í tí føroyska marknaðinum, og tískil eru vit sera spentir uppá at koma til Føroya”, sigur Guðmundur Sigórsson.

# Samstarv millum Fróðskaparsetrini á Akureyri og í Havn


*Fróðskaparsetrið á Akureyri*

**Fróðskaparsetrið á Akureyri strembar eftir samstarvi við Fróðskaparsetrið í Føroyum viðvíkjandi framleiðsluni av kervum, ætlað at tæna ídnaðarsamfelagnum og umsitingini**

*Mikael M. Karlsson*

Fróðskaparsetrið á Akureyri er ein almennur stovnur til hægri lesnað, stovnaður í 1987 og liggur á Akureyri í norðara partinum av Íslandi (har búgva um 16.000 fólk). Síðani stovnssetingina er næmingatalið vaksið úr 13 til 1.575. Fyrstu frálæruevnini vóru sjúkrarøkt og handilsfyrisiting. Fróðskaparsetrið er í løtuni í ferð við at leggja um, og frá heystinum 2006 vera fýra fakultet: handilsfyrisiting og nátturuvísind, heilsuvísind, útbúgving, lógarverk og samfelagsvísind. Fróðskaparsetrið bjóðar útbúgvingar á Bachelor-støði innan átjan ymisk øki, sambært vegleiðing frá teimum fýra fakultetunum, og Masters útbúgvingar innan lógarverkið, heilsuvísind, pleygu, nátturu tilfeingisvísind, útbúgving/frálæru og fiskarívísind. Setrið er í leiðandi støði innan fjarlestur um ravmagnsmediu.

Fróðskaparsetrið á Akureyri strembar eftir, at frálæran er á høgum støði í øllum lærugreinum. Serstakliga viðvíkjandi nýtsluvísindagreinum og tænastum til útjaðaraøkið og handilssamfelagið, samstundis sum krevjandi læru- og granskingarevni, eisini á undirstøði vera framd. Stovnurin hevur serligt atlit til læru og gransking tengd at polarøkjum og samstarvar neyvt við arktiskum granskingarstovnar, sum eru tilstaðar á stovnsøkinum, tildømis ”Program for the Protection of the Arctic Marine Environment” (PAME), ”Conservation of Arctic Flora and Fauna” (CAFF) and ”The Vilhjálmur Stefánsson Arctic Institute”. Setrið hevur havt leiðandi støði innan samskipanin av ”The Northern Research Forum”, sum skapar støði fyri effektivum, støðisviðkomandi kjaki og felags gransking viðvíkjandi norðurlendskum evnum.


*Næmingar, ið lesa jura á Fróðskaparsetrinum*

### Altjóða akademiskt samstarv

Fróðskaparsetrið á Akureyri er virkið innan altjóða akademiskt samstarv og víðkar nógv um hetta økið í løtuni. Vegna serliga atlitið sítt, er Setrið virkin gevi til ”The Arctic University” verkætlanina, samstundis sum tað luttekur í altjóða umbýtisavtalum, sum tildømis ERASMUS og NORDPLUS. Fyri at lætta um umskiftið av studentum, lærarum og granskarum, vera rættiliga nógv læruskeið hildin á enskum. Tó so, Setrið er tilvitað um at fremja tað ìslenska málið, sum sjálvsagt er høvuðs undirvísingarmálið hjá stovninum.


*fiorstein Gunnarsson, Skúlastjóri á Fróðskaparsetrinum á Akureyri*

### Samarbeiði við Føroyar

Fróðskaparsetrið á Akureyri hevur serligan áhuga í at styrkja bondini við Fróðskaparsetrið í Tórshavn, við tí í hyggju at býta tilfeingi, soleiðis at bygt kann verða upp nýtilig há-góðskaði akademisk program á báðum stovnunum. Bæði bi-lateral og multi-lateral samstarvs-skipanir eru ætlað at fremja. Slíkt samstarv hevði styrkt um orkuna hjá báðum stovnunum at tæna handilssamfelagnum og umsitingunum í báðum londunum. Í undan-samráðingum við Fróðskaparsetrið, eru ætlanir havdar á lofti um samstarv innan lógarverkið, Tekniskum-vísindi og sosialum vísindaligа frálæru. Eitt umboð fyri Fróðskaparsetrið á Akureyri, harra Mikael M. Karlsson, lektari á lógar- og sosialu vísindardeildini verður partur av íslendsku handils sendinevndini, sum vitjar í Føroyum frá 5. til 7. apríl. Hann skal hitta starvsfelagar frá Fróðskaparsetrinum og føroysk umsitingar umboð, í eini roynd at fremja hesar ætlanir.